## Bann ímóti perum

Í Noregi umhugsar orku- og oljumálaráðharrin Odd Roger Enoksen at banna øllum handli við teimum vanligu elektrisku gløðiperunum. Hugskotið er ikki nýtt. ES hevur boðað frá, at felagsskapurin ætlar at arbeiða fyri at banna gløðiperunum, og í Avstralia ætlar stjórnin at seta eitt tílíkt bann í gildi í 2012. Ístaðin fyri tær vanligu gløðiperurnar skulu fólk brúka spariperur, og umhvørvisverndarfelagssk apir taka undir við hugskotinum.

## Illir útróðrarmenn

Í Noregi eru útróðrarmenninir í øðini inn á stjórnina, sum í dag legði fram eitt uppskot um nýggja fiskivinnuskipan, sum millum annað ber í sær, at kvotur hjá útróðrarbátum skulu kunna seljast og keypast. Útróðrarmenninir siga, at broytingin fer at gera enda á tí vanliga útróðrinum, tí at kvoturnar verða savnaðar á færri hondum enn nú. Samarnir í Norðurnoregi eru eisini í øðini inn á uppskotið, tí tað fer ikki at gagna útróðrinum har, siga teir.

# Bispur tímir ikki upptakið

**Hans Jacob Joensen, bispur, hevði ætlað at sitið valskeiðið út, men tímir ikki upptakið, sum verður eftir yvirtøkuna av fólkakirkjuni, ið bispur metir verður skundað ígjøgnum. – Har kemur nógv arbeiði at liggja eftir yvirtøkuna, og tað tími eg ikki at brúka mítt síðsta ár til, sigur hann**



BISPAMÁLIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

15. november í 1990 tók Hans Jacob Joensen við sum bispur, og hevur hann sostatt sitið í nærum 17 ár. Um vikuskiftið boðaði hann frá, at hann leggur frá sær sum bispur 1. november í ár – eitt ár fyrr enn hann annars hevði ætlað.

– Eg hevði ætlað at sitið eitt ár aftrat, sigur Hans Jacob Joensen, og staðfestir at so verður tó ikki.

Yvirtøkan av fólkakirkjuni er beinleiðis orsøkin til avgerðina hjá bispi. Hann heldur ikki tað er rætt at yvirtaka fólkakirkjuna áðrenn allar lógir og kunngerðir eru gjørdar.

– Har kemur nógv arbeiði at liggja eftir yvirtøkuna, og tað tími eg ikki at brúka mítt síðsta ár til, sigur hann avgjørdur.

– Eg kann brúka tríggjarfýra mánaðir til tað, og so kann onkur annar koma og taka um endan, heldur bispur fyri og sipar til, at frá tí, at fólkakirkjan verður yvirtikin á ólavsøku og hann fer frá 1. november, ganga nakrir mánaðir.

### Vandamikið at seta dato á

Tað, at har verður nógv arbeiði eftir, at fólkakirkjan er yvirtikin, kemst sambært bispi rætt og slætt av, at tað ikki er arbeitt nóg mikið við málinum frammanundan. Málið hevur ikki fingið ta tíð, sum tað krevur. Tað merkir, at tað arbeiði, sum bispur heldur átti at verið gjørt frammanundan, má gerast aftaná.

– At seta dato á nær fólkakirkjan skal yvirtakast er ógvuliga vandamikið. Tað er tað fyri so vítt í øllum málum. Latið vera við at seta dato á, men gevið heldur málinum tað tíð tað krevur, so vit kunnu siga, at nú eru vit komin á mál, ella í hvussu so er rættiliga langt, og kunnu yvirtaka tá ella tá, eru ráðini frá bispi.

### Skuldi frá í 2008

Annars vísir Hans Jacob Joensen á, at tað fyri so vítt ikki er nakað nýtt, at hann fer frá sum bispur næstum.

– Eg eri 69 ár og donsku reglurnar siga, at eg so skal frá um eitt ár. Nú verður tað so bara eitt ár fyrr enn ætlað, staðfestir Hans Jacob Joensen, sum nú hevur sitið í út við 17 ár í starvinum sum bispur í Føroyum. Hetta er eitt langt áramál, men Hans Jacob Joensen vil vera við, at tað kortini ikki var nøkur trupul avgerð, hann boðaði frá á fundinum fyri kirkjuráðslimir, sum var leygardagin.

– Tað var fyri so vítt ein løtt avgerð. Eg fari frá 1. november í ár og tað er ófrávíkiligt, slær skjótt fyrrverandi bispurin fæst.

### Vil ikki peika á eftirmann

Nú Hans Jacob Joensen fer úr sætinum, skal ein nýggjur bispur finnast. Men Hans Jacob Joensen ynskir ikki at peika á, hvør hann sær sum ein møguligan eftirmann.

– Hatta er ein spurningur, sum eg absolutt ikki vil viðmerkja, sigur Hans Jacob Joensen, ið heldur, at tað ikki hevði tænt nøkrum nakað, um hann nevndi møguligar komandi bispar.

# Yvirlýsing tikin aftur

**Á aðalfundinum hjá Felagnum fyri Kirkjuráðslimir í dag, varð ein yvirlýsing tikin aftur og ein onnur vrakað**

FÓLKAKIRKJAN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Nevndin hevði lagt fram uppskot um yvirlýsing, har ið kravt varð, at avvarðandi landsstýrismaður í kirkjumálum skal vera limur í Fólkakirkjuni. Fleiri vísti á, at tað er óheppið, um ein, sum ikki hoyrir til Fólkakirkjuna, skal góðkenna ritualini.

Uppskotið møtti tó harða mótstøðu, og summi sóu uppskotið sum eitt persónligt álop á sitandi landsstýrismann, Jógvan á Lakjuni.

Eisini varð víst á, at landsstýrismaðurin í kirkjumálum einans hevur hægsta umsitingarliga vald, meðan bispur hevur evsta vald á kirkjunnar innaru virðum.

Eftir lívligt kjak, tók formaðurin í felagnum, Tummas Lauritssen, uppskotið aftur.

Seinni varð eitt annað uppskot lagt fram um at senda yvirlýsing til landsstýrið við áheitan um at útseta yvirtøkuna, til lógararbeiðið er liðugt.

Hetta uppskotið kom til atkvøðugreiðslu og varð felt við 14 fyri og 41 ímóti.

Annars hevði nevndin eitt uppskot til lógarbroyting. Tað snúði seg um at broyta navn felagsins til Felagið fyri kirkjuráð. Soleiðis skulu kirkjuráð vera limir í felagnum og ikki hvør einstakur kirkjuráðslimur sum nú er. Hugskotið við lógarbroytingini er, at tað fer at gera tað lættari at umsita limagjald og tílíkt.

Uppskotið bleiv tó fyribils tikið av skránni, tí at ivi varð sáddur um, hvørjar avleiðingar ein tílík lógarbroyting hevur.

Nevndin ætlar at kalla inn til eykaaðalfund fyri at fremja hesa lógarbroyting í viðtøkum felagsins.

## Fakta um
# Hans Jacob Joensen:

**Hans Jacob Joensen** er føddur 10. november 1938 við Gjógv

Fekk studentsprógv í Havn í 1958.

Útbúgvin cand.theol. á Københavns Universitet í 1968.

Frá 1968 til 1970 var hann búfastur kapellanur (hjálparprestur) við Onnu kirkju á Nørrebro í Keypmannahavn. Frá 1970 til 1975 búfastur kapellanur við Risbjerg kirkju. Síðani flutti hann heim til Føroya, har hann frá 1975 var búfastur kapellanur við Havnar kirkju. Trý ár seinni gjørdist hann sóknarprestur, og tað var hann frá 1978 til 1990, tá hann gjørdist varabispur 1990. Seinni sama ár gjørdist Hans Jacob Joensen biskupur, men 1. november í ár leggur hann frá sær – eitt ár fyrr enn ætlað

# Um bispaembætið

Biskupurin er geistliga hávyirvaldið í stiftinum. Hann hevur eftirlitið við prestunum og kirkjuráðunum í stiftinum. Biskupurin gevur prestunum loyvisbræv (kollats) at virka sum prestar, og eingin kann gerast prestur í fólkakirkjuni uttan loyvisbræv frá biskupi. Hann skal eisini síggja til, at próstar og prestar í tænastu síni halda seg til trúarjáttan evangelisk-luthersku fólkakirkjunnar, og at teir fylgja fyriskipaðu gudstænastuskipan og ritualum fólkakirkjunnar.

Kirkjuliga lóggávan letur í ein vissan mun biskupinum upp í hendur at taka avgerðir í ávísum málum. Tað er lítið biskupinum til atskipaalla prestatænastuna í stiftinum. Í ávísum førum gevur lóggávan biskupinum myndugleika at geva undantaksloyvi, eitt nú hvat fyriskipanini um konfirmatión viðvíkur.

Biskupurin er í ávísum førum eisini kærumyndugleiki; til dømis skulu kærur um kirkjuráðsval fyrst leggjast fyri biskupin.

*kelda: www.folkakirkjan.fo*

# Stutt um lóggávuna

Anordning nr. 886 fr 8. december 1999 om ikrafttræden for Færøerne af lov om udnævnelse af biskopper og om stiftsbåndsløsing

§ 1. Til biskop kan kun udnævnes personer, der har bestået teologisk kandidateksamen fra et universitet i Danmark og opfylder betingelserne for at blive ansat som præst i folkekirken.

§ 4. Kirkeministeriet fastsætter en frist for anmeldelse af kandidater vedafstemningen. Anmeldelsen, der indgives til vedkommende stiftsøvrighed, skal være underskrevet af mindst 50, højst 150 stemmeberettigede stillere og skriftligt tiltrådt af den opstillede kandidat. Den, der er stiller for flere kandidatlister, kan ikke anses for stiller for nogen af listerne. En kandidat kan ikke være stiller for en kandidatliste, hvorpå den pågældende selv er opført som kandidat.

§ 6. Er der kun opstillet to kandidater, skal kirkeministeren indstille den kandidat, der har fået flest stemmer, til kgl. udnævnelse. Hvis stemmerne står lige, afgør kirkeministeren, hvem af de to kandidater der skal indstilles til kgl. udnævnelse.